**Russar taka heimin á bóli**

Russar eru ikki blíðir, tá ið teir koma til Peenemünde og síggja, at USA er farið við tí mesta, bæði rakettum, serfrøðingum og skjølum. Heilt tómhentir fara russar tó ikki úr Týsklandi. Og teir eiga eisini sjálvir dugnaligar rakettserfrøðingar, Korolev, Glushko og fleiri aðrar.

Sergey Pavlovich Korolyov, 1907-1966, var verkfrøðingur ættaður úr Ukreina. Í lestarartíðini í Moskva hittir hann fleiri rakettserfrøðingar og 22 ára gamal vitjar hann Tsiolkovski. Undir útreinskingunum í 30-árunum verður hann sendur til Sibiria. Kendi flogmaðurin Topulev roynir at hjálpa honum hesa truplu tíðina, og seinni verður Korolev maðurin, sum kemur at standa á odda fyri sovjettisku rakettroyndunum í kappingini við USA.



Heimsins fyrsti rúmdarmaður Juri Gararin (vinstrumegin) og sovjettiski rakettserfrøðingurin Sergei Korolev.

17. september í 1957 er 100 ára dagur fyri føðing Tsiolkovskis. Tá hevur ætlanin verið at senda ein fylgisvein út í rúmdina og í ringrás um jørðina, men tað hevur so ikki eydnast. Dagurin varð hátíðarhildin í Sovjet. Ein eldugaður Korolev helt røðu og greiddi frá, at nú var fylgisveinurin Sputnik næstan liðugur.

Ein onnur orsøk, at gera vart við seg um hetta mundið, var, at 1957-58 var lýst at vera altjóða geofysiskt ár. Um kvøldið 4. oktober í 1957 vóru Korolev og hansara fólk til reiðar at snara startlykilin.

Sputnik 1 var ein aluminiumskúla, 58 cm í tvørmál, sum vigaði 83,6 kg. Tað var ein R-7 rakett, sum setti Sputnik í ellipsuskapaðu ringrásina. Mesta frástøða frá jørðini var um leið 947 km og minsta frástøða 228 km. Ráshallið við ekvator var 65°, og umferðartíðin einar 96 minuttir. Sputnik var í ringrás, til hann datt niður 3 mánaðir seinni, 4. januar í 1958. Antennustengurnar, 285 cm langar, høvdu samband við ein radiosendara, sum sendi nøkur eyðkend radioljóð aftur á jørðina. Tey vóru eisini at hoyra í Útvarpi Føroya, sum byrjaði at senda hetta sama árið. Umborð vóru tól at mála hitan í farinum. Hóast ikki stórvegis nýggj vitan fekst úr hesi verkætlan hjá Sovjetsamveldinum, var talan um marksetandi hending í rúmdargranskingini.

**Sputnikhvøkkurin**

Korolev og hansara fólk hava verið greið yvir, at hetta fór at vera stórhending, men neyvan hava tey grunað, hvussu víðfevndar fylgjur verkætlan teirra fór at fáa. Amerikanarar talaðu eftir hetta um "sputnik-hvøkkin". Teir skiltu t.d., at neyðugt varð at styrkja undirvísingina í náttúruvísindum, skuldu teir kappast við Sovjet. Ávirkanin av amerikanska undirvísingarátakinum breiddi seg víða um vesturheimin og rakk eisini til Føroya.

Aðalskrivarin Nikita Khrusjtjov skilti ikki beinanvegin, hvussu stórur sovjettiski propagandasigurin var, men tá ið vitið rann at honum, gav hann Korolev boð at hava ein nýggjan Sputnik til reiðar 7 november, tá ið kollveltingin fylti runt.

Hetta var í roynd og veru ein ómøgulig uppgáva, men longu 3. november í 1957 høvdu teir skrumblað eitt nýtt far saman, og Sputnik 2 varð sendur í ringrás um jørðina. Hetta farið vigaði munandi meiri og var á flogi í næstan 200 samdøgur. Umborð var hundurin Laika. Tey fyrstu trý umførini um jørðina hoyrdist hundurin goyggja, og hann át eisini, men so var tøgn. Einar 6 tímar livdi hann, men doyði so av strongd og ovurhiting, tí køliskipanin virkaði ikki, sum hon skuldi. Fyrsta teknið, at hundurin var strongdur, var, at pulsurin, sum var farin heilt upp ígjøgnum, tá ið rakettin fór uppfrá, fall so seint aftur.

Oddamaðurin fyri sovjettisku rúmdarætlanunum, Sergei Korolev, gjørdist ikki gamal maður. Tað var stórur smeitur fyri Sovjet, at hann fór so ungur. Korolev hevði nakað somu støðu í sovjettiskum rakettmálum sum Wernher von Braun hevði í teimum amerikonsku.

**USA roynir seg**

Eisini í USA varð arbeitt undir trýsti. Ein roynd at fáa fyrsta fylgiveinin í ringrás 6. des. í 1957 miseydnaðist. Vanguard rakettin sprongdist, men fylgisveinurin helt og fór at senda á eini baðistrond í Florida. Hann varð skjótt doyptur ´Kaputnik´.

Amerikanarar fóta sær tó skjótt aftur, tí longu í januar í 1958 eydnast teimum at fáa fylgisveinin Explorer 1 í ringrás. Við hesum fylgisveini fáast tær fyrstu ábendingarnar um, at tvey belti við sterkari geisling eru um jørðina. Tey standast av, at partiklar frá sólini verða fangaðir í jørðmagnetfeltinum. Beltini verða nevnd van Allen belti eftir James van Allen.



Sputnik (Спутник) 1, sum varð sendur í ringrás um jørðina 4. oktober í 1957. Aluminiumskúlan var 58 cm í tvørmál og vigaði 83,6 kg. Radioljóðini frá Sputnik 1 vóru eisini at hoyra í Útvarpi Føroya, sum fór at senda hetta árið. Helst hava tey á Bryggjubakka tikið ljóðini upp hjá BBC ella aðrari útvarpsstøð.



Týski rakettserfrøðingurin Wernher von Braun, sum eftir seinna heimsbardaga stóð á odda fyri amerikonsku rakettroyndunum. Fýra av teimum fimm ovurstóru rakettmotorunum á Saturn V rakettini daga undan. Tað var Saturn V rakettin, sum árini 1969-1972 gjørdi tað møguligt at flyta seks manningar (tólv rúmdarmenn) upp á mánan og aftur á jørðina.